Hafnafjørðinum beint við Reykjavík. Vit fingu so arbeiði á hesum virkinum saman við áðurnevndu skopuningum. Vit vóru 10 ella 12 manns tilsamans, sum her fingu arbeiði.

## Búleikaðust har menn høvdu skotið seg

Innivist fingu vit uppi á loftinum á einum gomlum fiskahúsi, sum var frá teirri tíðini, tá ið tann danski kongaligi handilin var í Íslandi. Vit fingu eina eldri konu at gera mat fyri okkum, so vit høvdu tað gott í allar mátar. Tað vóru tvey stór rúm ella kømur við koyggjum í at búgva í.

Hurð var inn í hvørt kamar frá køkinum. Úr hinum endanum á køkinum var eitt kamar til kokkin. Har kom trappan upp, sum var inngongd hjá okkum frá fiskakjallaranum.

Í hesum fiskakjallara vóru vesini, so niður har skuldi man fara. Tað var sagt, at tveir manns høvdu skotið seg har niðri, so man var ikki heilt álvuligur at fara niður í hetta stóra skýmliga rúmið á miðaru nátt.

Størsti parturin av fiskinum, sum virkið arbeiddi, var kongafiskur, sum tað fekk frá trolarum. So fekk virkið eisini nakað av torski frá bátum, sum royndu fyrst við línu og síðani við gørnum á vertíðini.

Her kom alt til sættis. Uggarnir av tí stóra torskinum, ið varð skorin til flak, blivu saltaðir, síðani pakkaðir og útfluttir.

Somuleiðis var við skræðuni, hon bleiv eisini saltað og útflutt. Tað bleiv sagt, at skræðan bleiv brúkt í skógvaframleiðslu. Eisini bleiv tann størsti torskurin og tann størsti upsin, sum var uppi í veiðuni hjá trolarunum, tikin burtur úr og flaktur.

Hetta varð gjørt í einum skúri, sum stóð fyri seg sjálvan niðan fyri flakavirki. Har var eg nokkso nógv saman við onkrum íslendingi. Fiskurin kom inn á gólvið har, og nakað av brúktum ísi varð koyrt út yvir.

Her lá fiskurin oftast heilt leingi. Hann varð so moyrur, at tað bar til at hála ryggin burtur úr uttan knív.

Men tá ið fiskurin kom burtur úr aftur saltinum, sá hann slett ikki so galin út! Tað var ikki so frægt, at tað bleiv brúkt nýtt salt.

## So við báti

Eg var so har eina tíð, men ein dagin bleiv eg spurdur av leiðsluni, um eg vildi fara við einum av teimum bátunum, sum landaðu til virkið. Ein maður við hesum báti hevði forfall.



*Umborð á Stjarnuni í 1956. Vit gera reint. Aftan fyri borðið sæst Johan Hansen, sum var við okkum í Grønlandi í 1950. Hann var giftur við pápasystir mínari. Framman fyri borðið ein ungur íslendingur*



*Umborð á Torkil Mána. Her liggja vit og tóga sum tað kann síggjast á trolveirinum*



*Umborð á Torkil Mána. Tað líðir væl til heimferðina, sum tað sæst á saltfiskastakkinum frammi við bakkan í bakborð. Tá ið fiskurin bleiv umrivin fór hann í lastina*

Eg tók av. Hesin báturin æt Stjarnan og var uppá 100 tons. Tá ið eg var biðin við, royndi hann við línu. Eg var so við har í tríggjar dagar. Tá kom hesin góði maður við aftur, og eg fór so aftur á fiskavirkið. Men tá ið garnatíðin kom fyri, bleiv eg biðin við sum fastur maður.

Har var eg so við alla vertíðina, og mær dámdi sera væl. Tað gekk eisini rættuliga væl við fiskiskapinum. Tað vóru eisini yvirhøvur fittir menn, serstakliga skiparin og stýrimaðurin.

Tá ið vertíðin var av um mánaðarskiftið apríl-mai, fór eg av. Eg fór til Reykjavíkar, har fekk eg saman við pápa kjans við Torkil Mána, sum var ein trolari upp á eini 5-600 tons.

Við honum varð farið til Grønlands á saltfisk. Har var rokfiskiskapur. Tað var tað eisini hjá føroysku trolarunum hesa tíðina. Vit vóru ein mánaða til fiskiskap, so var báturin fullur. Tað fjarðaði ongantíð av dekkinum frá tí, vit kastaðu, og til trolið bleiv lagt á dekkið. Hetta eru tær størstu nøgdir av fiski, eg nakran tíð havi sæð. Tað bleiv so farið heim til Reykjavíkar.

Inni á Reykjavík lá trolarin Røðull av Hafnafjørðinum. Honum væntaði fólk, og vit báðir feðgarnir fóru so við honum.

Tá ið vit komu umborð, var eg spurdur, um eg vildi verað annar kokkur. Hesum tók eg so av, og dámdi mær sera væl. Kokkurin var heldur váttligur, men vit komu sera væl út av tí. Hann var stak fittur í móti mær.

Vit vóru so tveir túrar við Eystur-grønland á kongafiski. Túrarnir vóru ikki langir. Tað var nógv at fáa. Tað at tað var ísfiskur, avmarkaði eisini túralongdina. Vit vóru so tveir túrar við, og tá vit komu aftur av tí seinasta túrinum, skuldi báturin á sleipistøð.

Mær var tá bjóðað at arbeiða umborð, meðan báturin stóð uppi og síðan halda á fram, tá ið hann fór aftur í virksemi. Eg tók ikki av, men fór heim.

## Heim og yvir aftur til Íslands

Vit vóru ikki leingi heima, men fóru yvir aftur. Tað var á nøkulunda sama hátt sum fyrru ferð. Tað var ikki nakað fast vit fóru yvir til. Tað vanliga var, at menn fóru á Frelsunnarherin í Reykjavík og fingu sær innivist. So komu menn, sum høvdu brúk fyri fólki, hagar at fregnast, um nakar var at fáa har til arbeiðis.

Soleiðis var eisini hesu ferð. Tað var rættuliga skjótt, at har kom ein maður úr Vestmannaoyggjunum, sum skuldi hava nakrar menn. Hesin maður átti ein bát um 40-50 tons. Báturin æt Sæfari. Vit vóru tríggir føroyingar, sum fóru við har, pápi mín, eg og so ein víkamaður, Poul á Torlabrúgv. Tað vóru bara vit tríggir, sum vóru føroyingar.

Vit royndu við gørnum eftir sild. Tað var millum nakað og einki at fáa, men hetta var eitt strævið arbeiði. Tá ið vit drógu gørnini, var ein maður sum dró tey inn við spælinum. Samstundis stóðu fýra ella fimm manns aftur eftir og hálaðu gørnini aftur ímillum okkum.

Samstundis sum sildin varð rist úr teimum. Hetta hevur verið sum við teimum føroysku sildaskipunum. Arbeiðið var møðsamt fyri armarnar.

Seinni fóru vit at fiska upsa við snellu, men tað var á sama hátt. Urtøkan var sera lítil. Vit vóru við har, til vit fóru heim um heystið.

## Aftur stóð illa til

Várið eftir fóru vit yvir aftur til Íslands. Tá fóru vit beinleiðis í Vestmannaoyggjarnar.

Farið var sum vanligt uppá óvist. Eg egndi hjá onkrum línubáti og hevði okkurt fyrifallandi arbeiði. Vit fóru eisini at rógva út við einum lítlum báti, sum pápi hevði fingið at reka.

Hann var komin at kenna ein skúlalærara, ið átti bátin.

Hesin bátur var sum ein lítil seksæringur til støddar. Tað gekk eisini bara væl, tá ið tað viðraði. Ein dagin mundi tað gingið galið hjá okkum. Tað var eitt sindur keðiligt veður, og vit høvdu fingið rættuliga væl av fiski. Pápi mín skuldi so sigla upp aftur.

Íslendingurin og eg vóru farnir í lugarið. Í tí hann slakar av, og báturin misti ferðina, søkkur hann niður og byrjar at taka sjógv inn. Gamli rópti so á okkum at koma at kasta fiskin út, men tað hevði hjálpt lítið í einari knappheit. Til